## *Oddagrein*

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# EIGA AT VIÐGERA STJÓRNARSKIPAN

Formansskapur Løgtingsins skal í næstum taka støðu til, um Løgtingið skal sleppa at viðgera uppskotið um stjórnarskipan Føroya. Væntandi tekur formansskapurin somu støðu sum seinast, at uppskotið kemur til viðgerðar.

Juristar bæði í løgtingsumsitingini og í løgmálaráðnum danska hava víst á, at uppskotið um stjórnarskipanina er í stríð bæði við grundlógina og við heimastýrislógina. Tað kann vera, at jurain fær trupulleikar av hesum - so onkur fyrilit mugu helst takast, men vit mugu ikki gloyma, at politikkur - tað at vilja broytingar - onkuntíð má takast fram um juraina. Um tað ikki var, so vóru fleiri viðurskifti øðrvísi, tí tað er so mangt broytt, sum ikki er í tráð við grundlógina, sum einki nevnir um, hvussu demokraiið í Føroyum skal verða skipað.

*- Nú rædur um, at tjóðskaparligu mótpolarnir í føroyskum politikki ikki skerpa klórnar hvør ímóti øðrum, men at vit við eini stjórnarskipanarlóg finna eina gongda leið, har allir partar vinna seg til rættis.*

Soleiðis segði Jóan Pauli Joensen, sum var formaður í grundlógarnevndini, seinni stjórnarskipanarnevndini, í fororðunum í álitinum, sum hann flaggdagin í 2004 handaði løgmanni. Hann helt fram, at stjórnarskipanin skal bert taka støði í fólksins egna vilja. Tí tað er bert Føroya fólk, ið kann taka avgerð um



egna lagnu, og hetta var aðalmálið, segði hann.

Og rætt er tað. Vit hava í meira enn 100 ár stríðst um ríkisrættarligu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Vit hava ikki endiliga stríðst við danir, men vit hava stríðst innanhýsis, og tað er hetta destruktiva stríð, sum má halda uppat. Vit koma ongan veg, um flokkarnir halda fram eftir hesum meiningsleysa leisti. Tí er uppskotið um nýggja stýrisskipan eitt kærkomið høvi, har vit kunnu strika vøllin upp av nýggjum, leggja til viks sambands- og loysingarstríðsøksirnar og definera okkum sum land og sum tjóð og hvussu vit skipa okkum sum samfelag - og hvussu viðurskiftini við danska ríki skulu broytast, um føroyingar einaferð skuldu viljað tað.

Endamálið við stjórnarskipanarlógini skal sjálvandi ikki vera, at Føroyar skulu úr danska ríkinum. Men skulu vit tað einaferð, so skal avgerðin sjálvandi liggja hjá okkum, og vit skulu vita akkurát, hvussu hon skal takast, so vit ikki næstu 100 árini fara at trætast um eina forvirraða fólkaatkvøðu frá 1946.

**Ein semja um stjórnarskipanina er kærkomin**

## Jóhanna og frú vitja løgmann

Í kvøld koma forsætisráðharri Íslands, Jóhanna Sigurðardóttir og maki hennara, Jónína Leósdóttir við fylgi til Føroyar á almenna vitjan.

Týsmorgunin verður farið út í Koltur. Seinnapartin verður vitjað í Norðurlandahúsinum, á Listasavni Føroya og á Føroya Fornminnissavni. Týskvøldið er løgmaður vertur við einum døgurða í Kirkjubø. Mikumorgunin hevur løgmaður bjóðað Jóhonnu Sigurðardóttir til morgunmat í Tinganesi saman við landsstýrisfólkunum. Aftaná verður fundur millum løgmann og íslendska forsætisráðharran, og klokkan 11 verður tíðindafundur í Tinganesi.





Jóhanna Sigurðardóttir og fylgi fara av landinum seinnapartin mikudagin.

## Skúm kemur frá algum

Umhvørvisstovan fær av og á fyrispurningar um skúm í fjøruni

Fólk, ið ganga við strendurnar um summarið, leggja ofta merkið til hvítt ella brúnligt skúm á sjónum. Umhvørvisstovan hevur spurt seg fyri og metingar siga at talan er um algur og sostatt ikki um dálking. Slím frá algum gerst til skúm tá tað brýtur eitt sindur.

Talan er sostatt um eitt natúrligt fyribrigdi, sum er heilt vandaleyst. Myndirnar eru tiknar á Hvítanesi.





**Hvussu við Boðanesi, Heðin?**

JÓNA MORTENSEN
KJAK Á SÍÐU 26



**Latið grindahvalin fáa frið?**

AGGA NICLASEN
KJAK Á SÍÐU 25

## Portrett av Barbaru í Gongini

Fríggjamorgunin klokkan 9:30 danska tíð hevur danska sjónvarpsrásin, DK4, eitt portrett av føroysku Barbaru í Gongini.

Sjónvarpstøðin skrivar, at Barbara í Gongini »er for tiden en af Danmarks mest interessante designere.«

Í sendingin ferhon at greiða frá um hugsanirnar aftan fyri sniðgeving hennara, samanrenningina av kvinnuligu og manligu sniðgevingini, eins og burðardygd, sum er nakað, sum Barbara í Gongini leggur stóran dent á.

Tey, sum hava CanalDigital síggja DK4, sum eisini vísir sendingar á heimasíðuni www.dk4.dk



Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*